# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Seinasta heilsanin

Góði Dánjal
Góði flokslærari!

Hví hendi hettar........?
Hví ert tú ikki her meira..........?
Hvat við øllum ið vit skuldu.....?
Hví vardi tað so stutt.........?
Hví, hví...?
Tað eru so nógvir ósvaraðir spurningar.

Vit hava havt minningarløtu um teg á skúlanum.
Vit sungu, lósu úr Bíbliuni og vit bóðu.
Vit sluppu at gráta,
vit sluppu at skriva og tekna okkara sorg,
niður á pappír.
Men tað er soooo svárt...
Og tað fer at vera so svárt framyvir at koma í skúla,
koma inn í flokstovuna og tú ert ikki har.

Vit vildu ynskt at vit kundu sagt tær farvæl

Alt sýnist strævið tá ein er 12-13 ár,
Bæði skúli og alt, men tú dugdi so væl.
Tú skilti okkum, og tú var góður við okkum.
Við hvørt mátti tú tala at,
tá vit ikki uppførdu okkum sum 12-13 ára gomul.
Tú var ikki líkaglaður.
Tú ynskti at vit, sum Tínir næmingar
máttu hava góðan atburð fyri at koma víðari í lívinum.

Tú dugdi at fáa alt so áhugavert,
søgu, danskt, enskt og
ikki minst kristnitímarnir.
Og so telvingin, aftaná skúlatíð.



*Dánjal Sjúrður Ennistíg, Klaksvík*
*f. 10. juni 1956 – d. 30. oktober 2005*

Góði Dánjal!
Í allari sorg okkara, vilja vit siga tær TAKK
Og tey góðu minnini um teg,
tey goyma vit í hjørtum okkara.

Vit síggjast aftur heima hjá Jesupápa

Vit sakna teg.

**6 & 7 fl. á Viðareiði**

## Andlát og jarðarferðir

**Tummas Pauli Jacobsen,** skipari, ættaður úr Nólsoy, búsitandi í Havn, andaðist 1. november, 81 ára gamal.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Unu Olsen fer** úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 16.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Unu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

Anna **Elisabeth Justinussen,** vanliga nevnd Betta við Stein, Glyvrar, andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi 1. november, 93 ára gomul.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Frits Witt,** Miðvágur, fer til gravar úr Miðvágs kirkju hósdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.
Tey, ið vilja minnast Frits kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Sparikassa.

síggja í myndunum hjá Mikinesi, t. d. fyri Jarðarferð, í Sakni ella Aftur av Jarðarferð. Í hesi mynd av kvistinum í fýra dimensiónin er likamligt hjálparloysi við at taka yvir í einum lítlum kamari síðst í fimmti árunum og fyrst í seksti árunum.

Mong eru ellisvomm. Lívið, sum nú fjarar burtur í slitnum hondum og lívsmerktum andlitsbrøgdum, hevur bert eina vón fyri framman. Tað er tann andaliga ímyndin av tí veika ljósinum, sum er í myndunum hjá Mikinesi, sum dettur inn um gluggan. Har, sum ljós er, er vón, og ljósið, sum skínur í myrkrinum, sum dettur inn um tað lítla vindeygað, er í breyðinum og víninum, sum til tykkum verður úthelt til syndanna fyrigeving. Torvkassin var himnastólurin, og kamarið var forgarðurin til ríki Guðs. Eitt, sum vit mugu drýpa høvur fyri, er tann tign, spekt og sómi, sum hesar kvinnur høvdu fyri tí andaliga. Eitt lítillætni yvir fyri guddóminum, sum bar boð um heilagleika og reinleika, sum var sum ein gloria í fyriklæðnum hjá Dunga Oluffu. Lívið hevði verið baldrut og tungt, sum hesar kvinnur høvdu riðið av sær. Nú var bara tann æviga kvirran eftir, sum tepraði í breyðbrótingi.

### Polaris

Mia mostir var mangan í Fuglafirði og rætti okkum eina hond, tá ið móðir kendi snertin av giktini og ofta var á sjúkrahúsi. Tá kundi hon koma um Fuglafjarðar boðar við t. d. Polarisi. "Jaki" við sínum ljósa sinni goymdi væl at ferðafólkinum, sum hann skjútsaði bygdanna millum. Jákup dugdi væl við fólk og við sínum skemtiliga sinni kendu øll seg væl saman við honum um borð á Polarisi. Øll søgdu hann so góðan til hetta yrki. Hann kendi bæði dygdir og lastir hjá sínum skipskundum. Pól Martin, bátasmiður, beiggi Miu, gav sær ofta góðar stundir og reið kanska ikki altíð sama dag, sum hann saðlaði. Einki ilt um tað. Hann kundi koma heim eftir Bakkalið og ætlaði sær við Polarisi. Jákup bíðaði, hóast hann var komin hálva leiðina eftir Bakkanum, kundi hann venda innaftur eftir onkrum, sum hann hevði gloymt. Einum sinni mamma, Hanna og greinskrivarin vóru og vitjaðu og skuldu yvirumaftur við Polarisi, var mamma ikki útskavað, tá ið farast skuldi. Hon bað meg renna norður á kaina og biðja Jákup bíða eitt sindur. Fór norður og segði hetta við Jákup. Hann svaraði: "Systir bátasmiðin, veit eg!" Jú, so var. Jákup kendi veikleikarnar og styrkina hjá hesum fólkum. Jákup bíðaði. Hetta var tann tíðin, tá ið løtan, sum var, varð løgd í tann drátt, sum gav degnum annað innihald. Sum dagur tín er, skal styrki tín vera. Hóast tað rullaði illa um Nestanga og Boðarnar, var Jákup hin sami. Hann var sálin í Polarisi, einum postbáti, sum bæði Mikenes og Amariel hava gjørt ódeyðiligan í síni list.

### Aftur í Ansastovu

Ja, Mia, hetta er bara ein lítil partur, sum tú hevur upplivað. Enn er tað hugnaligt at koma norðurum og sita við slagborðið og hyggja at kvistunum í køkinum, sum eru teir somu enn tann dag í dag. Átta systkin vóru tit í tali, sum vórðu borin í heim, og sjey komu undan. Enn sita tit báðar, Kristina mostir á Skorpisheyggi og tú, í Ansastovu so prýðiligar. Ikki er Margretha drotning eins tignarlig, sum tit eru - og verri enn so!

Eitt rend um ánna, so ert tú inni á Skorpisheyggi. Har hava Meinhard og Kristina flutt tíðina í vældæmdan búna úr gamlari mentan, sum tey bóru við sær av Gutta og úr Ansastovu. Tað vóru góðir dagar, tá ið átta ljóðkát børn spældu undir bitunum á Skorpisheyggi, og tað var altíð pláss fyri einum afturat. Har, sum hjartarúm er, er eisini húsarúm.Tá ið tú hevði verið á gátt á Skorpisheyggi, lá leiðin oman til Poul Martin og Edil. Á sama hátt. Eisini átta ljóðkát børn undir bitunum, og tú var vælkomin... so hjartaliga vælkomin.... Magda og Johannes á Línheyggi búðu beint heimanfyri hjá Edil og Poul Martini. Johannes segði altíð við meg, tá ið eg kom norður at ferðast um sumrarnar: - Nú er tú komin. Í hesum orðum lá ein ljósur andi av einum hjartalag, ið átti dagin og løtuna, ið gav seg til kennar í fýra orðum. Ein staðfesting av einari hending, sum vardi øll míni barnaár.

Úr Ansastovu, inn á Skorpisheygg oman til mammubeiggja var ein tríhyrningsleið í einum degi, sum livir í huganum enn tann dag í dag. Góð minni sum dagliga verður róð aftur á, og nógv gott fæst í heintan.

Mia, nú hevur tú livað í níti ár í túsund ár av einum degi og førningin, sum tú fekst, hevur tú mangan latið til onnur í familjuni. Hetta hevur verið tín dygd í hesum degi. Jú, sum dagur tín er, skal styrki tín verða.

Mia góða, hjartaliga til lukku við níti ára degnum.

**Frits**

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Frits Witt**
**Miðvágur**

andaðist 30. oktober, 75 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju hósdagin 3. november kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Anna Maria, Margrethe og Liljan**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sigrid M. Dalsgaard,**
**f. Poulsen**

andaðist og fór til gravar.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til Tórshavnar Ellisheim.
Takk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig takk til starvsfólkini á Tórshavnar Ellisheimi, sum vóru um hana ta seinastu tíðina.

*Familjunnar vegna*
**Kjartan, Suni, Jens og Magni**